

## 30 ár við Mezzoforte

Heimskendi íslendski tónleikabólkurin Mezzoforte spælir í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið 29. mai. Mezzoforte hevur brotið slóð fyri íslendskum tónleiki uttanlands. Bólkurin var stovnaður í 1977. Fýra ungir vinmenn, sum allir brendu fyri í fusjóns -og funk tónleiki, stovnaðu bólkin, og fyrsta fløgan kom út í 1979. Í 1983 gjørdust teir heimskendir við lagnum "Garden Party". Lagið kom á hittlistarnar um allan heim, og Mezzoforte fekk altjóða viðurkenning. Mezzoforte hevur lætt um hjá øðrum bólkum og einstaklingum at verða kendir uttanlands.

# Tað var ferðaætlanin ikki Másin

**Sambært Norðlýsinum í gjár var Másin ikki nóg fínur til starvsfólkini hjá Strandferðsluni, tá tey vóru útferð í Svínoy leygardagin. Men sambært stjóranum á Strandferðsluni var tað ikki Másin, sum hevði skuldina. Tað var ferðaætlanin**





*Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni, staðfestir, at tað ikki var Másin, sum var orsøkin til, at fólkini hjá Strandferðsluni ikki fóru við Másanum, tá tey vóru útferð í Svínoy leygardagin*

SAMFERÐSLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár skrivaði Norðlýsið á forsíðuni, at Másin ikki var nógv fínur til starvsfólkini hjá Strandferðsluni, tá tey vóru útferð í Svínoy leygardag. Fólkini hjá Strandferðsluni fóru nevniliga við Silju Star, Froyu og Alfa Pilos. Tað var tað ókeypis at sigla við Másanum og øllum øðrum oyggjaleiðum leygardagin, og tí skuldi sambært Norðlýsinum verið laga manni at siglt við Másanum til Svínoyar.

Sambært Norðlýsinum vísir hetta, at Másin ikki er nóg góður til fólkini í økinum, tí sjálvtábyrgdarfólkini av skipinum, halda hann ikki vera nóg góðan til ein stuttleikatúr. Tí undrast Norðlýsið, at Másin skal vera nóg gott samband við umheimin hjá teimum í Fugloy og Svínoy.

Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni, er als ikki samdur við Norðlýsinum.

- Vit eru ikki ov fín til Másan. Vit fóru eina útferð, sum vit fara á hvørjum ári. Úferðin varð fyriskipað av starvsfólkaleiðaranum, og hann hevði valt hendan leistin til útferðina, sigur Bogi Mortensen.

Hann leggur afturat, at tað hevði passað so illa við ferðaætlanini, tá fólk skulu koma allastaðni úr landinum. Enntá úr Suðuroy.

Men er ferðaætlanin so nóg góð, tá tað ikki ber til at koma til Svínoyar úr Suðuroy sama dag?

- Tað ber altíð til at diskutera, um ferðaætlanin er nóg góð, men vit skipa ferðaætlanina so væl, sum vit kunnu, útfrá teimum arbeiðskarmum og fíggjarkarmum, sum vit eru undirløgd, sigur Bogi Mortensen.

# Hesir elska tingarbeiðið

**Í gjár kom fram, at Alfred Olsen, Tórbjørn Jacobsen og Karsten Hansen ikki verið burtur til nakran fund í allari tingsetuni, og sambært teimum sjálvum, er tað millum annað, tí at teimum dámar arbeiðið so væl**

UPPMØTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Teir tríggir eru allir samdir um, at orsøkin til, at teir eru so nógv í tinginum, er, at teimum dámar arbeiðið so øgiliga væl.

- Eg trívist væl í tinginum og í tingarbeiðnum sum heild, og at mann møtir til arbeiðis er nakað, eg havi verið vanur við at alt mítt arbeiðslív, sigur Tórbjørn Jacobsen, tingmaður, sum sjálvur triði hevur møtt til hvønn fund í tingsetuni.

Karsten Hansen tekur undir við Tórbirni Jacobsen og greiðir frá, at tað er ein spurningur um hugburð.

- Eg fari á tingfund, tá tað er tingfundur, tí tað er mítt arbeiði. Við hvørt stendur mann undrandi, tá fólk spyrja, hvat annað mann ger. Millum manna er tað næstan vorðið til, at tingarbeiðið er vinstrahondsarbeiðið, og mann skal gera okkurt annað eisini, sigur Karsten Hansen.

Alfred Olsen kundi ikki verið meiri samdur við hinar báðar.

- Eg gleði meg at koma til arbeiðis hvønn dag, og eg haldi øgiliga lítið um, at summi næstan ikki hava tíð at vera í tinginum. Tey hava boðið seg fram, og tá tað berst frá, eru eykamenn eisini, sum kunnu taka stólin. Tí haldi eg ikki, at tað er nøkur orsøk til at nakar stólur í tinginum stendur tómur, sigur Alfred Olsen, sum sambært honum sjálvum, bara hevur verið ein dag burtur úr tinginum seinastu 11 árini.



*Karsten Hansen og Tórbjørn Jacobsen hava saman við Alfredi Olsen møtt til hvønn einasta tingfund í hesi setuni. Alfred Olsen er í Eysturoynni í dag, men nú er tingið eisini fari í feriu*

## Heilsan nakað at siga

Men teir eru eisini allir tríggir samdir um, at heilsan hjá fólki hevur ein avgerandi leiklut.

- Eg havi verið øgiliga heppin at hava eina góða heilsu, greiðir Alfred Olsen frá.

- Sjálvandi kann sjúka gera, at fólk ikki fáa møtt, men eg haldi uppmøtingin er ein spurningur um hugburð, sigur Karsten Hansen.

Tórbjørn Jacobsen tekur undir við teimum báðum, men hann heldur ikki, at tannlæknar og annað eru nakað mann fær orðna teir fleiri enn 260 dagarnar, tá ongin tingfundur er.

- Eg hevði einaferð lungnabruna umborð, men eg kundi ikki lata stýrimannin ganga vakt alt døgnið, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum heldur tað vera ein sjálvfylgju, at mann møtir upp til arbeiðis.

## Einasta lógarsmiðjan

Hóast Tórbjørn Jacobsen ikki heldur, at uppmøting neyðturviliga merkir, at ein tingmaður er dugnaligur, so heldur hann at teir hava ein skyldu at møta í tinginum.

- Hetta er einasta lógarsmiðja í landinum, og tí haldi eg at mann kann møta upp, teir fáu dagarnar, smiðjan er opin, sigur Tórbjørn Jacobsen.